## Starvsprofilur fyri løgfrøðing í Kommunufelagnum

**Høvuðsuppgávur**

1. Arbeiða við at styrkja og samskipa kommunuumsitingarnar í limakommununum, m.a. við at gera felags vegleiðingar og mannagongdir
2. Fyrireika og ráðgeva limakommununum í (einamest løgfrøðiligum) málum av felags áhuga, t.d. viðgera hoyringar- og ætlanarskriv frá stjórnarráðunum og mál av aðalregluligum týdningi fyri kommunurnar annars
3. Ráðgeva einstøku limakommununum í serstøkum málum
4. Virka við í skeiðum og mennandi tiltøkum fyri limakommunurnar
5. Umboða Kommunufelagið í arbeiðsbólkum
6. Samskifta við landsumsitingina, áhugabólkar og aðrar samstarvsfelagar hjá limakommununum
7. Savna saman og umsita vitan um kommunurættarlig viðurskifti

**Fakligur førleiki**

- Cand.jur. ella líknandi útbúgving
- Kunnleika til kommunurætt og fyrisitingarrætt
- Breið tilgongd til onnur lógarøki er ein fyrimunur, t.d. byggi- og býarskipanarmál, umhvørvismál, starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál og sosial mál
- Umsitingarligar ella aðrar viðkomandi royndir

**Persónligur førleiki**

- **Viðvíkjandi arbeiðsumhvørvi**

  Starvsfólkahópurin er lítil og uppgávurnar nógvar og skiftandi. Tí er neyðugt, at øll taka tøk saman, tá brúk er fyri tí, og ganga hvørjum øðrum til handa.

  Kommunufelagið er ein politiskur felagsskapur; politiskt tev er tí ein treyt fyri at kunna røkja starvið nøktandi, eins og hugurin at fáast við og meta um kommunupolitiskar spurningar - tó við størstu virðing fyri yrkisførinum.

- **Viðvíkjandi uppgávum**

  Hava evnini at fordjúpa seg í serstøk evni, men eisini kunna “hava fleiri bóltar í luftini í senn”

Vera før/ur fyri og tora at taka avgerðir og skera ígjøgnum í síni vegleiðing og ráðgeving av kommununum

Megna at lyfta spesifikkar spurningar upp, og viðgera teir á generellum støði, so viðgerðin gagnar heildini

Hava evnini at bera felags stevnumið og leiðreglur inn í kommunufyrisitingarnar

**Samstarvspartar**

- Stýrið og starvsbólkurin í Kommunufelagnum
- Politisku og umsitingarligu myndugleikarnir í limakommununum
- Landsmyndugleikar
- Onnur kommunufeløg og millumkommunalir felagsskapir – í Føroyum og uttanlands
- Onnur feløg og áhugabólkar

**Starvsheiti**

- Løgfrøðingur, Kommunufelagið

**Løn**

- Verður avtalað eftir fakligum førleika og royndum við støði í sáttmálanum hjá BLF

**Starvsstaður**

- Kommunufelagið, Tórshavn
- Væntast kann nakað av ferðing til limakommunurnar

**Arbeiðstíð**

- Vanlig arbeiðstíð er frá klokkan 8.00 til 16.00 við ávísum møguleika fyri flekstíð
- Arbeiðstrýstið er skiftandi; tí er neyðugt at tola at arbeiða meira og minni til tíðir, og at stórar, áleikandi uppgávur viðhvørt koma knappliga á

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær Eyðun Christiansen, stjóra í Kommunufelagnum, á telefon 282480 ella á telduposti eydunc@kf.fo.